# TB einsamalt á toppinum

**1. DEILD MENN** 07 Vestur megnaði ikki meiri enn 2-2 á útivølli ímóti NSÍ, og KÍ vann trivaligan sigur á Norðoyastevnu

Tróndur Arge

TB er einsamalt topplið í næstbestu deildini. Tvøramenn vóru hesa ferð á Argjum. Tað tók sína tíð, áðrenn teir fingu hol á, men eftir at Joseph Bassene eftir ein tíma hevði skorað fyrsta málið var eingin ivi. TB vann 3-0. Nú er fjarstøðan niður til 07 Vestur fýra stig, og tað er meiri, enn vágamenn kunnu vinna í dystinum teir, sammett við TB, eiga til góða.

Hesa ferð vitjaði 07 Vestur í Runavík, har tað enn eina ferð ikki gekk eftir vild ímóti einum av botnliðunum. Í 2. hálvleiki royndu gestirnir at leggja trýst á fyri at vinna fulla úrtøku, men tað spurdist einki burturúr.

Á Norðoyastevnu gekk tað betri hjá KÍ, sum vann 4-0 á FC Hoyvík. 2. hálvleikur, tá ið øll málini vórðu skorað, kundi bent á, at tað kann fara at ganga rætta vegin hjá klaksvíkingum, sum nú hava vunnið tríggjar ferðir á rað. Nú er KÍ bara eitt stig frá uppflytingarplássi. Hóast talan var um stóran sigur, so er tað ein partur av søguni, at tað var ikki fyrrenn at FC Hoyvík hevði mist ein mann, at tað glapp hjá KÍ, sum síðsta korterið skoraði trý mál.

FC Hoyvík hevur fingið tvey stig burtur úr fimm teimum seinastu umførunum.

Brian Olsen og Bjarni Jørgensen skoraðu málini í 2-0 sigrinum hjá EB/Streymi ímóti HB.

Eftir 1-0 tap á heimavølli ímóti Víkingi eiga toftamenn framvegis fyrsta sigurin til góða. Longu eftir 20 minuttir varð B68 undirmannað.

*trondur@sosialurin.fo*

## 1. Deild menn 10. umfar

**KÍ - FCH** 4-0 (0-0)
1-0: Steffan Kallsø 58.
2-0: Sámal á Tjaldrafløtti Olsen 76.
3-0: Henry Heinesen 83.
4-0: Henry Heinesen 86.
*Reytt kort:*
*John Eystberg, FC Hoyvík, 68.*
Dómari: Alex Troleis

**NSÍ - 07V** 2-2 (2-2)
1-0: Per Langgaard 9.
1-1: Jovan Panic 12.
1-2: Holgar Djurhuus 37.
2-2: Arni Gregersen 43.
*Reytt kort:*
*Ragnar Niclasen, 07 Vestur, 78.*
Dómari: Rói Jacobsen

**B68 - Vík.** 0-1 (0-0)
0-1: Andras Mikkelsen 83.
*Reytt kort: Oddur Højgaard, B68, 20.*
Dómari: Dia Lamhauge

**AB - TB** 0-3 (0-0)
Dómari: Andrew Christiansen
0-1: Joseph Bassene 60.
0-2: Hanus Mortensen 62.
0-3: Aron Sørensen 89.

**EB/Str. - HB** 2-0 (1-0)
1-0: Brian Olsen 4.
2-0: Bjarni Jørgensen 67.
Dómari: Bent Tommy Linklett

### Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 11 | 8 | 1 | 2 | 32 | 13 | +19 | 25 |
| 2 | 07 Vestur | 10 | 6 | 3 | 1 | 24 | 10 | +14 | 21 |
| 3 | KÍ | 10 | 6 | 2 | 2 | 23 | 10 | +13 | 20 |
| 4 | HB II | 11 | 6 | 1 | 4 | 23 | 24 | -1 | 19 |
| 5 | EB/Streymur II | 10 | 5 | 3 | 2 | 17 | 12 | +5 | 18 |
| 6 | Víkingur II | 10 | 4 | 2 | 4 | 16 | 16 | 0 | 14 |
| 7 | NSÍ II | 10 | 1 | 5 | 4 | 12 | 20 | -8 | 8 |
| 8 | FC Hoyvík | 10 | 1 | 4 | 5 | 9 | 17 | -8 | 7 |
| 9 | AB II | 10 | 2 | 1 | 7 | 10 | 23 | -13 | 7 |
| 10 | B68 II | 10 | 0 | 2 | 8 | 5 | 26 | -21 | 2 |

# Ein vanligur dystur fyri meg

**LØGMANSSTEYPIÐ** Týskvøldið verða seinnu hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið leiktar. Við Margáir tekur EB/Streymur ímóti B36. Fyrra hálvfinalan endaði við einum 2-1 sigri til B36 í Gundadali

Tróndur Arge

– Eg eri venjari og tað er eitt arbeiði sum øll onnur. Dysturin ímóti EB/Streymi er ikki nakað serlig fyri meg. Hinvegin er tað nakað heilt serligt at koma í steypafinaluna, væl móti okkum. Teir eru eitt gott lið, ið spælir skjótan fótbólt. Men seinasti dysturin ímóti teimum (1-1 í Gundadali í landskappingini, blaðm) vísir, at vit kunnu fáa møguleikar at skora tey neyðugu málini. Tað gjørdu vit ikki tá, men vónandi skiftinum og verða helst við. Eisini Daniel Udsen er um at verða klárur aftur, sigur Heðin Askham

Eisini B36 hevði bara ein mann við á ferðini.

– Eg trúgvi ikki tað kemur at hava so stóra ávirkan á liðið hjá

**Tað er eitt arbeiði sum øll onnur. Dysturin er ikki nakað serligt fyri meg**

ið er tann størsti einstaki dysturin, vit hava og tað er har, vit vilja vera, sigur Sigfríður Clementsen um møguleikan at vinna á sínum fyrrverandi arbeiðsgevara.

EB/Streymur hevur spælt tríggjar ferðir ímóti B36 í ár, men enn er tað ikki eydnast hjá sundalagsmonnum at vinna á árstalsfelagnum.

– Tað vísir seg, at B36 klárar seg gera vit tað hesuferð, sigur Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi.

Landsliðið hevur sum kunnugt verið á ferð seinastu vikuna, men hvørki EB/Streymur ella B36 eru serliga ávirkað av tí ferðini.

– Tað hevur onga ávirkan á liðið hjá okkum. Vit høvdu bara ein mann við á ferðini og tað var Egil á Bø. Brian Olsen og Bjarni Jørgensen spældu á næstbesta liðnum í vikuokkum. Vit høvdu bara Christian R. Mouritsen við og hann skoraði eisini einasta málið á ferðini. Eg trúgvi at landsliðstúrurin hevur ein positiva ávirkan á hann. Vit høvdu eisini Jákup á Borg við á ferðini, men hann kom sum kunnugt heim vegna skaða, sigur Sigfríður Clementsen.

Dysturin verður týskvøldið kl. 19.00 í Streymnesi.

# Leikbannaðir miðverjar

**LØGMANSSTEYPIÐ** Í fyrruhálvfinaluni í Fuglafirði vann Víkingur 2-1 og hevur sostatt bestu kortini á hondini. Men bara nakrar fáar dagar seinni brustu liðini saman í Gøtu í landskappingini og tá vann ÍF 3-1

Tróndur Arge

Í dystinum ímóti NSÍ fyri meira eini viku síðan, fekk ÍF tvey reyð kort og tað merkir at hvørki Poul ella Kaj Ennigarð kunnu verða við í seinnu hálvfinaluni. Teir báðir hava annars í at vit klára, sigur Ábraham Løkin, venjari hjá ÍF.

Í Gøtu eru tey greið yvir, at ÍF kann bíta frá sær.

– Eg eri spentur, men samstundis eitt sindur stúrin, tí vit blivu hólvaðir av í Gøtu seinast vit spældu

**Vit fara so at spæla við miðverjum, men akkurát hvør tað verður, er ikki greitt enn**

mannað miðverjuna hjá ÍF í ár.

– Vit fara so at spæla við miðverjum, tað liggur fast, men akkurát hvør tað verður tað er ikki greitt enn. Vit fara at hava eina sterka miðverju til dystin, tað eri eg vísur ímóti teimum. Tí mugu vit vera klárir til dystin, um vit ætla okkum til finaluna, sigur landsliðsmiðverjin hjá Víkingi, Atli Gregersen.

Í Fuglafirði hava tey góðar vónir um at síggja ÍF í finaluni.

– Eg trúgvi 100% uppá vit kunnu koma í finaluna. Um vit gera tað, ið vit skulu, so vinna vit dystin, sigur Ábraham Løkin, sum eisini fegnast um at Nenad Saric er tøkur aftur eftir skaða.

Tað er ikki bara í Fuglafirði, at tey hava leikbannaðar miðverjar.

– Niclas Niclassen er leikbannaður, meðan Hans Jørgin Djurhuus er byrjaður at venja aftur. Eg og Súni Olsen hava verið við landsliðnum, men vit eru báðir væl fyri og klárir at dystast um finaluplássið á Summarfestivalinum. Vit ætla at prógva, at tað ikki var av tilvild, at vit vunnu steypakappingina í fjør, sigur Atli Gregersen.

Dysturin í Gøtu byrjar kl. 18.30.

*trondur@sosialurin.fo*